Dagf. 8. mars 2021
HMR J. nr. 21/02381-8

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-090/2020 eftir § 52a í tingskipanini um at styrkja fyribyrgjandi arbeiðið hjá Gigni, frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at styrkja arbeiðið og tænastuna hjá Gigni?

2. Vil landsstýrismaðurin virka fyri at menna samstarvið millum barnapsykiatriska økið og Gigni, so at Gigni m.a. kann ávísa børn beinleiðis til barnapsykiatriina?

3. Vil landsstýrismaðurin virka fyri, at fyribyrgjandi arbeiðið í Gigni verður styrkt við t.d. sálarfrøðingum og sosialráðgevum tilknýttum, soleiðis at arbeiðið gerst meira tvørfakligt?

Svar:

Til spurning 1
Í sambandi við at barnatalið í landinum veksur, og samfelagsbroytingar seta stór krøv til foreldur og børn, er tað ein áhaldandi tørvur á at styrkja arbeiðið og tænastuna hjá Gigni.

Seinastu árini er virksemið hjá Gigni styrkt og víðkað til eisini at fevna um ávikavist fosturtøkuráðgeving og ættleiðingarráðgeving. Í løtuni eru tveir sálarfrøðingar knýttir at Gigni, ið veita supervisión til tey starvsfólk, sum veita hesa ráðgeving. Sum spyrjarin eisini vísir til, er peningur játtaður til at menna tilboð til børn millum 2 og 5 ár, umframt at lógin er broytt soleiðis, at møguleiki nú eisini er hjá heilsufrøðingum at veita heilsukanning og ráðgeving við inn- og útskúling.

í 2021 er peningur játtaður til kanningarháttin, sum kallast Alarm Distress BaBy scale (ADBB), ið verður brúktur í londum kring okkum til at kanna sosialt afturhaldni hjá pinkubørnum. Væntandi fara heilsufrøðingarnir við hesum kanningarhátti at avdúka sosialar og sálarligar trupulleikar skjótari enn áður, og síðani ávísa víðari til hjálp og viðgerð. Ætlanin er, at allir heilsufrøðingar á smábarnaøkinum hava fingið útbúgving í ADBB á heysti 2021.

Dagsins samfelag setur stór krøv til familjuna. Ein stórur og týdningarmikil partur av arbeiðinum hjá heilsufrøðingunum snýr seg um at stuðla undir at styrkja foreldraleiklutin og nærsambond í familjuni, og hesin parturin fer at vaksa í framtíðini. Landsstýrismaðurin ætlar at upprøfesta, at allir heilsufrøðingar verða uppskúlaðir til familjuráðgevarar eins og í Norra. Ein slík eftirútbúgving vil, sum skilst, geva heilsufrøðingunum størri førleika til m.a. at vegleiða og stuðla foreldrum at ungum við rúsmisnýtslu. Hetta er eitt mál, sum landsstýrismaðurin fer at taka upp til viðgerðar við Heilsutrygd/Gigni.

Til spurning 2
Samstarvið millum Gigni og Barna- og ungdómspsykiatriina eigur at styrkjast. Fyri at betra um bíðitíðina í psykiatriini, hevði tað verið ein stór hjálp hjá barni og familju, um starvsfólk í Barna- og ungdómspsykiatriini og avvarðandi heilsufrøðingur saman við familjuni kundu lagt eina ætlan fyri at tryggja teimum bestan stuðul í bíðitíðini.

Landsstýrismaðurin fer at samskifta við Heilsutrygd/Gigni og Landssjúkrahúsið/psykiartiska økið um, hvussu samstarvið kann styrkjast – og í hesum sambandi, um ávísingarrætturin hjá Gigni skal broytast.

Til spurning 3
Sum nevnt eru í løtuni tveir sálarfrøðingar knýttir at Gigni, ið veita supervisión til starvsfólkið, og eru partar av ættleiðingarráðgevingini og fosturtøkuráðgevingini. Í hvønn mun tað er tørvur á at styrkja Gigni fyri at loysa tær uppgávur, sum liggja fyri framman, fer at verða tikið upp til viðgerðar við Heilsutrygd/Gigni.

Heilsumálaráðið, 8. mars 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður